



*Edward Fuglø fekk eisini høvi at vitja á listarsøvnum í Wien, og her hyggur hann eftir einum av verkunum hjá Gustav Klimt*

# frímerki

# en



*Eitt av íbúðarhúsunum, sum Mozart búði í. Tað næstseinasta hann búði í og her vóru nøkur av hansara kendu verkum skrivað. Hann tjenti hópin av peningi hetta tíðaskeiðið, men nýtti eins nógv uppá kortspæl og vedding (gambling) – hetta er í dag gjørt sum Mozart-savn, alt sum tað er. Het síggjast eisini nøkur at handritunum hjá Mozarti*

nummar tvey í eini árligari kapping um vakrasta merkið í Europa.

### Vildu hava Edward at nikka

Føroyar eru í síni heild áhugaverdar hjá frímerkjakennarum og -samlarum.

Tað var sjónligt, at teir høgu harrarnir høvdu virðing fyri Edwardi Fuglø, sum hevði ómakað sær ta longu leið úr Klaksvík til Wien »bert« til at góðkenna eitt frímerki. Allir tóku tignarliga í hondina á Edwardi og vóru heldur fáorðaðir – heilir seks mans stóðu við sjálva prentmaskinuna. Teir stóðu og bíðaðu eftir einum nikki frá Edwardi sum tekin um, at dagurin kundi halda fram.

Tað er so ómetaliga nógv, sum kann vera at hyggja at: litendurgeving, kontrastir, pappírsgóðska, perforering, tekstur og annað.

Eftir nágreiniligar kanningar og samráðingar millum Edward Fuglø og Svanbjørg Manai, stjóra á Frímerkjadeildini, varð givið grønt ljós fyri, at enn eitt vakurt frímerki frá kønu hond Edwards kundi fara á marknaðin. - Merkið kemur út til heystar.

Vit heilsaðu eisini upp á gravørar, teknarar, teldufólk og sóu alla prentsmiðjuni. Vinarliga fylgdi trygdarvørðurin okkum alla tíðina og læt okkum fáa passini aftur, tá ið vit vóru komin at úthurðini.

Í Wien var eisini høvi at síggja spennandi bygningar, søvn og listarverk, og sjálvandi skuldi ein rættilig Wienarkonsert upplivast.



*Greinskrivarin og hini í ferðalagnum skuldu ígjøgnum strangt eftirlit, áðrenn tey sluppu inn á prentsmiðjuna*